

SJÓNDEPILIN
søkir eftir
deildarleiðara
til virkishús fyri
blind og sjónveik

Virkishúsið er nýtt sjálvstøðugt virkisøki. Deildarleiðarin verður við til at evna karmar og innihald í arbeiðinum, og kemur at varða av dagligu leiðsluni.

KRAV TIL PERSÓNLIGAR FØRLEIKAR:
Jalig (ur), tolin, nýskapandi, dugir at samskipa, taka ábyrgd, loysa ósemjur, hevur hugflog og evnir at læra frá sær ymiskt handaligt arbeiði.

KRAV TIL FAKLIGAR FØRLEIKAR:
- Útbúgving t.d. pedagogur, lærari, ergo terapeutur, ítrívsvegleiðari.
- Útbúgving innan ymiskt handverk ella hondarbeiði.
- Telduførleiki til vanligt samskifti.

SJÓNDEPILIN BJÓÐAR:
- Fakliga frálæru um sjón og sjóntrupulleikar – atlit og arbeiðshættir.
- Uppléran innan fakøkið við t.d. handaligum arbeiði – møgulig skeið.
- Møguliga vitjan á líknandi Virkishúsi aðrastaðni.

Starvið er fulltíðarstarv og setananarviðurskiftini eru sambært avvarandi sáttmála, sum eru galdandi fyri økið.

Ynskiligt er at starvið verður sett frá 1. apríl 2009 ella skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er fríggjadagin 13. februar 2009.
Eru fyrispurningar, kunnu tit ringja til Sjóndepilin tlf. 31 82 22 og spyrja eftir leiðaranum.

Hevur hetta starv tín áhuga, send so umsókn við prógv og CV til:
Sjóndepilin, Att. Leiðarin
Boks 2074, FO-165 Argir.

Grafik Studio

Fakta um Virkishúsið:
Virkishúsið er deild undir Sjóndeplinum. Húsi
rikið sum sjálvstøðug eind og liggur í mið
Havn. Brúkararnir, sum eru sjónveikir eru ei
ari seinmentir. Dagliga vera 2 starvsfólk knýt
num saman við møguligum gestalærarum.

Í Virkishúsinum verður vart arbeiði á trøðv
ymiskt handaligt arbeiði, arbeiði í køki, sosi
tiltøk í býnum, einsæris ella í bólkum. Pláss ve
uml. 10 viðskiftafólkum.

Málið er at geva brúkarunum ein gerandis
virðiligum uppgávum og innihaldi allar yrka

SJÓNDEPILIN
Sjóndepilin - Íslandsvegur 10 A
Postrúm 2074 - 165 Argir
Tlf. 318222 - Fax. 319288 sjon@sjondepilin.fo

# Tollfrítt sprutt og si

**Í dag er dagurin, tá tollfrí søla í flogfarinum steðgar. Tvær sølubúðir lata nevniliga upp á flogvøllinum. Vørurnar verða bíligari enn í Kastrup, men dýrari enn í Billund**

TOLLFRÍ SØLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



Á samkomu klokkan tíggju í morgun, vóru nýggju tollfríu sølubúðirnar hjá Atlantsflogi sýndar fram fyri innbodnum.

Fyrstu ferð tær verða nýttar verður tó ikki fyrr enn klokkan 13:45, tá fyrstu ferðafólkini fáa møguleika at keypa tollfrítt á flogvøllinum. Hetta verður í sølubúðini, sum er beint við, har mann finnur viðføri sítt aftur.

Í longri tíð hevur hetta verið fyrireikað, og Árni Winther arkitektar hava teknað sølubúðirnar, sum Articon hevur gjørt klárar.

## Fegnir fyrireikarar

Til samkomuna í morgun vóru fleiri, ið tóku orðið at fegnast um hesa nýggju skipan við tollfríari sølu.

Teir, ið tóku orðið vóru Christian Andreasen, nevndarformaður í Vága Floghavn, Jóhan Dahl, landsstýrismaður við vinnumálum, Dávur R. Hansen, stjóri í Vága Floghavn og Magni Arge, stjóri í Atlantsflogið.

Allir vóru teir fegnir um, at henda løta var upprunnin. Jóhan Dahl fegnaðist, at nýggj tiltøk verða sett í verk, tá pílarnir annars peika niðureftir og Magni Arge kallaði dagin søguligan, tí Barack Obama verður settur inn sum forseti, og Atlantsflog byrjar at selja tollfrítt á landi.

Eisini vóru menn raskir at nevna minkandi byrðuna í flogførunum, so meiri viðføri og fleiri ferðafólk sleppa í hvørt flogfarið. Hetta skul-

# Ikki bíligari ferðaseðlar

**Hóast Atlantic Airways fingur tollfríu søluna á flogvøllinum, so verður talan ikki um bíligari ferðaseðlar fyri tey ferðandi hjá flogfelagnum**

TOLLFRÍ SØLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, greiðir frá, at tað ikki verður bíligari at flúgva, hóast Atlantsflog fekk tollfríu søluna á flogvøllinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, fegnast stórliga, at flogfelagið fekk tollfríu søluna, men ferðaseðlarnir gerast ikki bíligari.

- Nú skulu vit selja meira fyri at vinna pening. Fyrr fór allur peningurin í kassan hjá okkum, tá vit seldu tollfrítt. Nú skal Vága Floghavn hava ein stóran part av peninginum, so vit skulu selja meira, fyri at fáa tað sama burturúr, sigur Magni Arge.

Hetta merkir altso, at Atlantsflog, á ein hátt missir pening av, at tollfría sølan verður flutt niður á land.

## Dýrka ikki

Hóast hann ikki roknar við, at ferðaseðlarnir gerast bíligari, so gevur tað ein stóran fyrimun hjá Atlantsflogi, at felagið fekk tollfríu søluna.

- Tú kanst siga, at ferðaseðlarnir heilt víst høvdu dýrkað, um vit ikki fingu tollfríu søluna, tí tað er tungt at dríva eina flogrutu, og tollfrí søla hevur verið ein avgerandi partur av inntøkunum hjá okkum. Tí kanst tú hinvegin siga, at ferðaseðlarnir ikki fara at dýrka, á sama hátt, sum teir høvdu gjørt, um onkur annar fór við tollfríu søluni, vísir Magni Arge á. Sum metir tað gerast tyngri og tyngri at hava eitt flogfelag, tí fleiri og fleiri vilja hava burturav.